


[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 17 - 11 - 2011

# Høgur oljuprísur hóttir evruna og heimsbúskap

Atljóða orkufelagsskapurin IEA sigur í eini frágreiðing, at tann høgi oljuprísurin kann vera ein hóttan móti eini endurreisn av europeiska gjaldoyranum evruni og búskapinum sum heild. Oljuprísurin á Brentmarknaðinum hevur í meðal hetta árið verið uppá 111 dollarar fyri tunnuna. Í 2010 var hann 80 dollarar. Tað hevur havt við sær eina øking í framleiðlsuútreiðslum og gjørt, at vanligi borgarin hevur havt minni pening um hendi. Henda gongdin nívir mest menningarlondini, og serstakliga tey fátæku menningarlondini, tí høgir oljuprísir hava eina sera negativa ávirkan á búskapirnar sigur stjórin í IEA, Maria van der Hoeven sambært Reuters. Í Europa ger høgi oljuprísurin teir veiku búskapirnar uppaftur veikari sigur hon. Europa dandar longu á tromini á eini veikari búskaparliga endurreisn og forsetin í europeiska miðbankanum, Mario Draghi hevur spátt, at tey 17 evrolondini eru longu ávegis móti einum lágkonjunkturi móti endanum á árinum. Undanmaðurin hjá Van der Hoeven, Nabuo Tanaka segði í farna mánað, at ein oljuprísur uppá 70 til 80 dollarar var góður fyri bæði framleiðarar og brúkarar, meðan ein framhaldandi prísur á Brent ráolju omanfyri 100 dollarar fer at skaða heimsbúskapin. Hóast ávirkanina, sum høgi oljuprísurin hevur við sær, vildi Van der Hoeven ikki úttala seg um, um Opec skuldi økja um framleiðsluna, tá ráðharranir hittast í desember. Tað má vera upp til Opec at gera av. Eg eri ikki Opec. Eg eri IEA, segði hann við Reuters. Tað hevði eisini verið ókløkt av gasframleiðarum at sett seg saman og gjørt eitt kartel legði hann aftrat. Ein bólkur av gassframleiðarum, heimsins størstu framleiðarar av LNG, flótandi gassi, møttust nevniliga í Qatar týsdagin. Feløgini birtu upp undir óttan um, at limir fóru at samskipa gassveitingina meira, men higartil hava limir sum Rusland, Venzuela og Iran ikki gjørt nakra slíka avtalu. IEA, sum ráðgevur stórum brúkaralondum um orkupolitikk,

roknar við, at gass fer at hava ein alsamt vaksandi týdning til tess at ganga framtíðar orkutørvinum á møti, nú eftirspurningurin veksur hjá londum I Asia við